## Ársins danski DJ í Føroyum




Leygarkvøldið vendir Dj Kato plátum í Eclipse. Danski plátuvendarin er nógv frammi í heimlandinum í løtuni og vann bæði "Årets Danske Mainstream DeeJay" og "Danish Deejay Battle" í 2007. Harumframt hevur Kato framleitt fleiri stór hitt fyri onnur tónleikanøvn, eitt nú Infernal, DJ Aligator og The Loft. Tónleikurin hjá Kato hoyrir til breiða House-tónleikin við íblástri frá soul, funk, klassiskum, hip hop og R'n'B. Sum plátuvendari leggur Kato seg eftir at endurframleiða tann tónleik, ið er uppi í tíðini.

## Helmer keypir meira fipur

Íverksetarin og milliarderurin Finn Helmer, sum í fjør vitjaði í Føroyum og hevði fleiri fundir her, hevur gjørt enn eina stóra íløgu. Maðurin, sum vann sær milliardir av krónum við at selja fyritøku sína Giga til Intel, hevur keypt uppaftur meiri av breiðbandsfyritøkuni ComX. Nú eigur hann tilsamans 75% av partabrøvunum í fyritøkuni, sum væntandi verður yvirtikið av Comendo innan stutta tíð. ComX mennir fipurkáplar til netloysnir, og umsita millum annað 400 km fipursamband.

# Jan gongur ov lætt um ál

**- Tað tykir mær, sum formaðurin í Føroya Fiskimannafelag gongur ógvuliga lætt um støðuna, og eg ivist í, um tað, sum hann førir fram, er haldbart. Hann kemur ikki við nøkrum útrokningum upp á nakað sum helst. Hetta er ein álvarslig støða fyri vinnuna, sigur Dánjal Jacobsen, reiðari í Vestmanna**

VERKFALLIÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var hin 19. desember, at semingsstovnurin við Terja Sigurðssyni á odda gavst við royndunum at finna semju millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag.

Føroya Fiskimannafelag hevði longu eina viku frammanundan lýst verkfall at koma í gildi 12. desember, men við tað, at semingsstovnurin vildi gera enn eina roynd at finna semju, útsetti stovnurin eitt møguligt verkfall í eina viku.

Hendan seinasta royndin bar ongan veg, tí partarnir stóðu so langt frá hvørjum øðrum, og tá ið samráðingarnar endaliga slitnaðu hin 19. desember, lýsti nevndin í Føroya Fiskimannafelag verkfall frá klokkan 18 at rokna.

Í fráboðanini hjá felagnum varð sagt, at verkfallið fevnir um allar limir felagsins, ið sigla við skipum, sum hoyra undir økið hjá Føroya Reiðarafelag.

Vegna stjórnina í Føroya Fiskimannafelag stóð Jan Højgaard, felagsformaður undir fráboðanini.

### Einki í ljósmála

Tað eru nú stívliga fjúrtan dagar, síðan fiskiflotin varð lagdur, men enn røkist einki fyri, at partarnir fara at sessast aftur við samráðingarborðið.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag hevur latið formannin í Føroya Reiðarafelag vita, at umboðini fyri fiskimenn eru til reiðar at samráðast, um felagið hjá reiðarunum heldur, at okkurt er at samráðast um. Á hinari síðuni hevur Føroya Reiðarafelag bjóðað fiskimonnum framhald av verandi sáttmála umframt nakrar krónur upp á eftirlønina. Í aðrar mátar sigur felagið hjá reiðarunum, at tað eru fiskimenn, sum eru farnir í verkfall, og tí liggur bólturin hjá teimum.

Jan Højgaard hevur sagt, at felagið vil ikki hoyra talan um, at fiskimenn í størri mun skulu luttaka í oljuútreiðslunum hjá skipunum, men við uppskotinum hjá reiðarunum um leingjan, sleppa fiskimenn undan øktari luttøku í oljuútreiðslunum.

Og so kortini er støðan millum partarnar at síggja til púrasta fastløst.

Semingsstovnurin fer neyvan at kalla partarnar saman aftur, fyrr enn stovnurin metir, at samráðingarnar kunnu føra til semju, men so leingi, sum hvørgin parturin letur nýggjar hurðar á glopp, eru útlitini til nýggjar samráðingar døpur.

### Gongur ov lætt

Ein av reiðarunum í Vestmanna, Dánjal Jacobsen, sum eigur ísfiskatrolaran Vesturbúgvan og helmingin av ísfiskatrolarunum, Nornagesti og Kolumbusi, heldur, at formaðurin í Føroya Fiskimannafelag gongur ov lætt um álvarsomu støðuna, sum fiskiflotin er komin út í.

- Tað tykir mær, sum Jan Højgaard gongur ógvuliga lætt um støðuna, og eg ivist í, um tað, sum hann førir fram, er haldbart.

Dánjal sigur seg hava heft seg við, at formaðurin í Føroya Fiskimannafelag í sínum úttalilsum ikki kemur við útrokningum upp á nakað sum helst, men sleingir um seg við ymiskum leysum póstandum.

Tað heldur hann vera ógvuliga undrunarvert og órógvandi, nú fiskiflotin hevur ligið í meira enn fjúrtan dagar.

- Hetta er ein álvarslig støða fyri skipavinnuna. Í okkara parti av flotanum er støðan tann, at tað skal ganga rættiliga væl, um skiparaksturin skal fáast at hanga saman, nú oljan er vorðin ein so tyngjandi partur á útreiðslusíðuni, sigur hann.

### Gera okkurt annað

Í samrøðu við Rás 2 í gjár segði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, at fiskimenn bara kunnu fara at gera okkurt annað, meðan verkfall er. Í hesum lá, at verkfallið saktans kann gerast drúgt.

Dánjal heldur hesi úttalilsi vera undarlig og vísir á, hvussu torført summir skipabólkar longu nú hava við at halda upp á fólkið, tá ið so nógv onnur tilboð eru uppi á landi – og í útlandinum.

- Eg freistast næstan at siga, at heldur Jan, at fleiri fiskimenn líka so væl kunnu gera okkurt annað, so kundi hann latið teir, sum tíbetur vilja sigla, sleppa at siga.

Reiðarin vísir á, at tað er alt avgerandi fyri skipini, at tey hava gott fólk.

- Fólkið er grundarlagið undir fiskiskipavinnuni, og við góðum fólki kanst tú fáa tað at bera til, tá ið annars sær eitt dapurt út. Tað er fólkið, sum ger, at teir smáu marginalarnir



*Vestmanna er trolarabygd burtur av, og nú verkfall er í fiskiskipaflotanum, royna reiðarar at gera eitthvørt, sum hevur ligið á láni – ella okkurt, sum skal gerast í nærmastu framtíð*

Mynd: Birgir W. Høgnesen



*- Skulu partarnir semjast í sáttmálatrætuni, er neyðugt at tosa um veruleikar – og ikki leysar pástandir, sum eingi tøl verða sett á, heldur Dánjal Jacobsen, reiðari í Vestmanna*

Mynd: Birgir W. Høgnesen